TING-HELLAN

# Føroysku politikararnir og Fólkatingið

TINGHELLUANALYSA
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*



**Fer fyrst valdi á Fólkating?**
Fólkatingið er ikki tann sessurin, sum stendur í fremstu røð hjá føroyskum politikkarum, og sjálvt teir sum leggja seg eftir honum, gera tað ikki fyri at skapa eitt betri danskt samfelag, men heldur fyri tæna Føroyum á Fólkatingi. Fleiri av flokkunum í Danmark vilja ikki, at tinglimirnir hava sonevnd dupultmandatir. Hetta førir við sær, at tað ikki bæði ber til at sita í býráði og Fólkatingi og/ella Evropatinginum. Soleiðis er ikki í Føroyum. Hóast flokkarnir ikki hava Fólkatingið raðfest ovast, so stilla flokkarnir við nærum sterkastu manning. Hetta ger, at bæði løgtingsumboð og landsstýrismenn stilla upp til valið, men Løgmaður og landsstýrisfólk mugu senda varafólk og tí tekur fyrst valdi ikki altíð av sessinum. Hetta sást m.a. tá Edmund Joensen og Høgni Hoydal høvdu varamenn fyri seg, meðan teir sótu í Landsstýrinum. Tingfólk royna kanska at røkja báðar sessirnar. Tað kann fyri vanliga borgaran tykjast torført at skilja, at bæði Fólkatings- og Løgtingssessur kann røkjast av sama persóni í senn, men tað tykist sum politikkarnir meta tað verða umráðandi fyri at kunna tæna søk føroyinga á Fólkatingi, at umboðið eisini er við í politisku skipanini í Føroyum. Soleiðis at skilja, at tað er ein fyrimunur hjá einum føroyskum fólkatings-umboðið eisini at sita á Løgtingi, so viðkomandi er heilt við í politiska lívinum í Føroyum. Tí er tað so, at um flokkarnir stilla upp í sterkastu uppstilling so fara topparnir í samgonguflokkunum helst at senda varamann á Fólkating, tí tann sessurin er ikki meira umráðandi enn at sita í Landsstýrissessi.

**Valluttøka**
Í Føroyum hevur vallutøkan til fólkatingsvalið verið ógvuliga svingandi. Seinasta val var hon 79,7%, meðan hon so seint sum í 1990 var 54,1% og í 1988 tað hægsta inntil seinasta val, nevnliga 70,3 %. Við seinasta fólkatingsval var støðan millum Føroyar og Danmark sera spent, og hevur tað helst havt ávirkan á, at vallutøkan bleiv so stór. Vallutøkan í Føroyum hevur verið serstakliga skiftandi til fólkatingsval. Ein vallutøka uppá um 50% er ógvuliga lág og eftir norðurlenskum støðið er hetta ikki serliga góð luttøka, men eisini ein týðilig staðfesting av, at føroyski veljarin ikki leggur líka nógv í fólkatingsvalið sum løgtingsvalið.

**Eitt valdømi**
Við samfelagsfrøðiligum eygum eru fólkatingsvalini spennandi av øðrum orsøkum enn bert tí politiska. Her eru Føroyar eitt valdømi. Sjálvt um evnini, sum tikin verða upp, ikki kunnu samanberast við Løgtingsval, so er talan hóast alt um eitt val millum á leið somu politikkarar, men í einum valdømi. Seinasta val høvdu toppskorarnir í flokkunum nógv flestar atkvøður. Í Fólkaflokkinum er talan um 43%, í Sambandsflokkinum 32%, Javnaðarflokkinum um 60%, Sjálvstýrisflokkinum um 59%, Tjóðveldisflokkinum 40% og Miðflokkinum 51% av flokksins atkvøðum. Hetta er ein greið ábending um, at til fólkatingsvalið savnast flokksveljararnir um eitt valevni. Hetta kemst helst eisini av, at talan bert er um tveir sessir og at hvør flokkur ikki kann rokna við at fáa meir enn eitt umboð valt. Tí er tað náttúrligt at savnast um eitt umboð, sum í hesum føri verður mettur av verða best egnað. At talan bert er um tveir sessir, kann eisini merkja, at veljarin gerst taktiskur at atkvøður fyri persóni og flokki, veljarin helst vil hava inn av teim, sum hildið verður hava møguleika at taka sessin.

**Veljarakanningar**
Veljarakanningar vinda alt meira uppá seg, og eru tær gerandiskostur tá val er. Hvussu hesar verða gjørdar, er tó sera ymiskt, eins á góðsku teirra. Men ikki skerst burtur, at hesar veljaralla meiningakanningar hava sera stóra ávirkan á bæði førda politikkin og taktiska spælið beint undan valinum. Tað eru lond sum ikki loyva almannakunngerðing av hesum kanningum beint uppundir val, tí hildið verður at tað kann ávirka veljaramedferðina. Men tað sæst í londum størri enn okkara, at metingar verða gjørdar eftir hesum kanningum, t.d. royna politikkarnir hendavegin at síggja akkurát, hvørji tiltøk teirra fáa fólk at vilja teir aftur. Eisini verður ofta kannað, hvat fólk og veljarar hjá uppskotsstillara halda um ávís uppskot, og verður tað beinanvegin brúkt í fjølmiðlunum, serliga um tað er eitt tiltak, sum ikki hevur fólksliga undirtøku.. Eftir mínum tykki, eru vit eydnutíð ikki farin so langt, tí um politikkararnir skulu taka avgerðir eftir hesum meira ella minni álitandi kanningum, er betri at broyta skipanina til beinleiðis demokrati. Í Danmark er hetta ein stórur partur av fjølmiðlametingini av samfelagsviðurskiftum og politikki. Tó so, hevur ein nýggj kanning sæð dagsins ljós í Føroyum, har atkvøðast kann við fartelefon. Kanningin sæst á InternetSosialinum. Hetta er áhugavert og ein lættur og harvið bíligur háttur at kanna uppá. Men fólk skulu aktiverað seg sjálvan at atkvøða, eins og við kanningum á alnótini. Í hesum føri ber so bert til at atkvøða eina fer við hvørjum nummari. Vansin er sjálvsagt, at bert fólk við fartelefon kunnu luttaka og at eingin vitan er um tey hava valrætt. Kanningin vísti hósmorgunin at Tjóðveldisflokkurin stendur at fáa 44%. Hetta kundi bent á, at antin hava tjóðveldisfólk óvanliga nógvar fartelefonir í mun til veljaran hjá hinum flokkunum, ella at tey hava fingið fólk at atkvøtt, tí tað er lítið sannlíkt at flokkurin fær nærum helmingin av atkvøðunum.

**Hvat kunnu føroysku umboðini gera á Fólkatingi?**
Ein spurningur, sum hevur verið nógv frammi, er hvat føroysku fólkatingsumboðini kunnu gera á Fólkatingi, og her eru í høvuðsheitinum tveir møgueikar: Innan fyri og uttan fyri donsku flokksskipanina.

**Uttan fyri flokksskipanina donsku**
Sum Heri á Rógvi vísir á í aðrari grein í blaðnum í dag, hava flokkarnir á Fólkatingi góðar karmar at arbeiða undir. T.v.s. at er eitt valt umboð partur av einum flokki, ella tekur seg saman í eitt samstarv sum t.d. Norðuratlantsbólkin, fæst nógv at arbeiða við., fylgir fígging við, sum gevur góðar møguleikar at arbeiða politiskt Tí kann sigast at norðuratlantsbólkafrymilin gevur betri arbeiðsumstøður, enn at verða leysgangari

Góðu fíggjarligu umstøðurnar til fólkatingsarbeiði er ein partur av danska demokratinum, og sum gevur fólkatingslimunum møguleika at arbeiða við størri ætlanum og breiðum samstarvi. Norðuratlantsbólkurin, sum hevur sitið seinasta valskeiðið, og var samansettur av tí eina føroyska liminum og báðum teim grønlendsku, hevur havt fullveldi sum mál. Undir hesi fyritreyt er tað sjálvsagt, at umboð sambandsflokkin ikki hevur vilja verið partur av samstarvinum.

Men ein kundi ímynda, sær at grønlendsku og føroysku umboðini hava so mikið til felags, at tað var ein fyrimunur at taka seg saman í eitt samstarv. Hetta skal síggjast út frá, at fólkatingsvalini í Føroyum og Grønlandi snúgva seg um viðurskiftini við Danmark og úteftir annars, og tí kundu hesi fýra umboð havt mál at samstarva um, hóast munurin millum Føroyar og Grønland er almikil.

Hin møguleikin er at standa einsamallur uttanfyri. Men hetta ger arbeiðsumstøðurnar sera truplar, tí vansin av ikki at hava samstarv, við tí skipan sum Fólkatingið hevur, er stórur. Tað tykist ikki sum um at tað er ein leistur, nakar av flokkunum í Føroyum leggur seg eftir. Er tað eitt ynski at halda seg burtur frá donskum innlendispolitikki, eru hesir báðir mátarnir kanska teir greiðastu.

**Innanfyri floksskipanina donsku**
Hinvegin eru eisini fyrimunir at verða partur av donsku flokksskipanini. Har koma umboðini inn á eitt flokksapparat, og kunnu tí brúka hetta at røkka málum. Føroyski fólkatingslimurin kemur jú inn í flokkin við einari atkvøðu og tí fígging sum fylgir við. T.v.s. at hesin hevur nakað at geva, ella selja um tú vilt, sum kann brúkast at røkka málinum. Føroyski fólkatingslimurin gerst partur av tí stóra politiska spælinum, og um taktisku evnini eru góð, kann limurin brúka sína ávirkan, við stuðli frá einum størri flokki, tá møguleikin er har. Fyri at fáa nakað burturúr innanfyri donsku flokkskipanina krevur, at talan er um politikkara, sum hevur dirvið at krevja. Hinvegin ger hesin leistur helst, at føroysku umboðini ikki samstarva á Fólkatingi, um tey mál semja er um. Hans Engel vísir tó í mikudagsog dagsins blaði á, at føroysku politikkararnir missa ávirkan, við at standa uttanfyri donsku floksskipanina. Afturat kann sigast, at hesin hátturin hevur møguleika at koyra føroysk sjónarmið fram innanhýsis í donskum flokkum.

**Fyrimunur av samstarvi**
nevndir, mál og samráðing
Við at gerast partur av einum samstarvi, líkamikið um tað er í einum samtaki av norðuratlantisku umboðunum ella sum partur av einum flokki, hevur samstarvið størri møguleikar at fáa nevndarsessir og vera við í samráðingum, og soleiðis at fara eftir útvaldum málum og at taka mál upp.

Fyri at meta um, hvørt tað er betri at verða partur av einum donskum flokki, ella einum norðuratlantiskum samtaki, er neyðugt at viga fyri og ímóti, um føroyski politikarin fær gjørt meira fyri Føroyar innanfyri í einum flokki, og við tí samstarvi tað kann hava við sær, ella um Norðuratlantsbólkfrymilin, við at hava eins serstakan bólk, sum bert arbeiðir við trupulleikunum hjá Føroyum og Grønlandi, gevur meira.

Hetta hevur eisini eitt sindur við uppmerksemi at gera, tí hátturin við at fara inn í ein flokk eisini merkir, at tað verður arbeitt meira í stillum, meðan hin leisturin eisini er at fáa almennu eyguni vend fyri málum av týdningi fyri Føroyar og Grønland. Harafturat verða føroyski umboðini ofta brúkt til at hjálpa føroyingum, sum á einhvønn hátt er komin tvørt fyri í skipanini, ella sum bara hava brúk fyri hjálp. Hetta verður av fleiri sæð sum ein týdningarmikil partur av starvinum hjá føroysku folkatingsumboðunum.

**Danska skipanin og tey fýra umboðini**
Í einari skipan, sum í stóran mun er bygd á breiðar langtíðarsemjur um nógv mál, og sum gera, at alt samfelagið ikki skal broytast hvørja ferð val er, eru nógvar samráðingar í Fólkatinginum. Hetta saman við, at tað er vanligt at hava minnilutastjórnir, sum so antin hevur ein fastan stuðulsflokk ella sum noyðist at finna ein meiriluta so hvørt. Her er tað mín meting, at norðuratlantisku umboðini úr Føroyum og Grønlandi, líka sum geva eitt rúm uttanfyri vanliga flokksbygnaðin. Tey verða, uttan mun til um tey er farin í ein danska flokk, ikki partur av fasta danska flokksbygnaðinum. Hetta ger so aftur, at hesar fýra atkvøðurnar kunnu brúkast til at fáa mál samtykt sum eru trupul og ikki hava stóran meiriluta. Tí hóast t.d. føroyska atkvøðan í slíkum spæli bert er tann eina, so verður tað hon sum fær heiðurin av at gera munin, sum t.d. at Óli Breckmann sat í kongastóli, tá TV2 helt 10 ára føðingardag sín. Hesin hátturin at síggja skipanina, gevur sostatt donsku flokkunum ein møguleika at koyra free riding, skilt soleiðis, at tað í eini javnstøðu eru atkvøður úr Føroyum og/ella Grønlandi sum avgerða, og tí kann eingin lastast avgerðunum.